





Íbúðin í kjallaranum





# Sethús við íbúð í Suðurrás í Tórshavn

Húsini standa í Suðurrás, sum er ein blindvegur frá Frælsinum. Umhvørvi er friðarligt og barnavinarligt. Tað eru bert 100 m til Venjingarskúlan, Læraraskúlan og frítíðarskúla. Vøggustovan og barnagarðin á Landavegnum og á Øksnagerði eru í umhvørvinum.

Somuleiðis er stutt til Vesturkirkjuna, Landssjúkrahúsið, Fróðskaparsetrið, Náttúrugripasavnið og nógvu arbeiðsplássini á Vestaru Bryggju og Viðarnesi.

Tað tekur bert fáa minuttir til gongu til býin – eisini er stuttur teinur til gongu oman á Sandagerð.

Rundanum húsini er ein stórur urtagarður við fleiri hugnaligum krókum og skotum og vøkrum blómubedum, runnum og trøum. Her eru nógvir møguleikar til tey, sum dáma væl at brúka nakað av tíð í urtagarðinum og eisini er stórt og gott pláss til børnini at spæla í.

Húsini eru í trimum hæddum. Í miðhæddini er ein durur, gongd, baðirúm, køkur, stova og tvey kømur. Frá stovuni er útgongd til eina terassu og víðari út til urtagarðin. Bæði frá stovuni og køkini kanst tú njóta góða útsýnið yvir vakra urtagarðin.

Á loftinum er ein stór hugnalig loftsstova, vesi og tvey kømur. Í loftsstovuni eru vindeyguni frá loft til gólv, so her er ljóst og opið.

Í kjallaranum er ein íbúð, sum hevur vesi, baðirúm, køk, stovu og eitt kamar. Inngongdin til íbúðina er til eitt felags kjallararúm. Eisini er felags vaskirúm og turkirúm. Íbúðin gevur tær góðan møguleika at fáa eitt eyka ískoyti til húsaleiguna.

Tú fært meira at vita um ognina við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Búðstaður: | Suðurrás 10, Tórshavn |
| Byggiár: | 1977 |
| Hæddir: | 3 |
| Stødd innan: | 245 fermetrar |
| Grundøkið: | 400 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 2.500.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**